LM-099/2023

Eiðis kommuna • FO- 470 Eiði • Faroe Islands
•Tlf. (+298) 200400 • T-post: eidi@eidi.fo, • Heimasíða:http://www.eidi.fo,

Fylgiskjal 53

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Tinganes
100 Tórshavn

Eiði, tann 23.februar 2024

Viðmerkingar til uppskot til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

Í sambandi við uppskotið hevur Eiðis kommuna hesar yvirordnaðu viðmerkingar ella spurningar.

1. Í uppskotinum stendur, at inntøkan frá náttúrugjaldinum verður at deila lutfalsliga millum, kommunu, bygdir og eigarar av hagunum.
   a. Eftir hvørjum býtislykli verður hetta gjørt?. Er talan um íbúgvaratal, markatal ella?. Hetta hevði verið gott at fingið upplýst, so metast kann um, í hvønn mun henda løgtingslógin kemur at vera útreiðsluneutral ella kemur at viðføra øktar útreiðslur fyri kommununa.

2. Halda gøtur og bygdagøtur
   a. Partur av gjaldinum skal nýtast til at halda bygdagøtur – Er talan eisini um gomlu bygdagøturnar. Fleiri av hesum bygdagøtum ganga um kommunumark. Er talan um tann partin, sum er innanfyri kommunumark.

3. Landsstýrismaðurin fær ov stórar heimildir at lóggeva í økinum.
   a. Landsstýrismaðurin fær heimild til at ognartaka lendi, um tað ikki longur kann brúkast til upprunaliga endamálið, hví skal landið kunna ognartaka ein haga. Hetta er yvir alt lágmark at ein landstýrismaður kann hetta.

4. Um eitt ferðafólk kemur til skaða úti í náttúruni,undir einum skipaðum túri? hvør ber ábyrgdina av tryggingini hjá avvarandi haga, landið, kommunan ella hvør?

5. Vit eru heldur ikki samd um, um ferðavinnan skal koma inn um bygdamark enn. Sum kommuna ynskja vit heldur, at tann einstaki festarin/bóndi/eigari tekur sær av hesum og gera tað meira skipað. Og at kommunan saman við festara kemur við greiðum reglum um hvussu farast skal fram.

6. Í sambandi við fíggjarligar avleiðingar og umhvørvisligar avleiðingar so krevur hetta alt ov nógv av okkara øki. Sum er longu nú sæst slit á gøtum niðan á Kollin og niðan á Slættaratind, og kemur hetta ikki at blíva betri við hesum lógaruppskoti.

7. til §8 Kommunan ber allan kostnaðin av at gera nýggjar gøtur. Tað er landið sum krevur at hendan lóggávan kemur í gildið. Landið kann ikki krevja at kommunan skal gjalda fyri at viðlíkahalda og gera nýggjar gøtur

8. Til §12 Hvat við teimum ferðandi sum sjikanera íbúgvarnar, tað stendur ongastaðni um hetta. Tað er øllum kunnugt, at tey ferðandi sjikanera íbúgvarnar við teirra myndatólum, serliga á teimum smærru økjunum, inn gjøgnum vindeyguni.

9. ímillum linjurnar á hesum uppskotið kann lesast, at fleiri kommunur er tvungnar at leggja saman, serliga tær heilt smáu. Tí hvør kommuna sær, hevur ikki peningaliga orku at seta ein ferðavinnumennara í starv, ella gera gøtur osv

EIÐIS KOMMUNA

Annsy Høghamar, borgarstjóri